MELDURIN

## Helena Dam á Neystabø

# SAMHALDSFESTI TRYGGJA OKKUM VÆLFERÐINA

**Haldføri í búskapinum er avgerandi fyri um fólk tíma at búgva í Føroyum, heldur Helena Dam á Neystabø**

Árni Gregersen



Hann kemur sjálvandi ikki frá fremmandum – áhugin fyri politikki hjá Helenu Dam á Neystabø, løgtingskvinnu fyri Javnaðarflokkin.

Pápin, Atli P. Dam, var í nógv ár formaður í Javnaðarflokkinum, umframt at hann eisini í nógv ár var Føroya løgmaður. Tað sama var abbin, Petur Mohr Dam – í mong ár ímyndin av Javnaðarflokkinum.

Nú umboðar hon Javnaðarflokkin á tingi.

– Tað sum eg havi størsta áhugan fyri eru tey langsiktaðu málini og haldføri í búskapinum hevur allarhægstu raðfestingina, sigur Helena Dam á Neystabø, sum hevur sæti í fíggjarnevndini.

– Fyri at vit kunnu hava eitt samfelag, sum fólk tíma at búgva í, so skulu vit sum politkkarar tryggja eitt samfelag við trivna og tryggleika. Tað eru avgerandi treytir fyri at fólk flyta aftur til Føroyar, sigur hon.

Helena Dam á Neystabø hevur verið aktiv í samfelagskjakinum í mong ár. Longu í Hoydølum var hon partur av nevndini í næmingafelagnum og hon hevur síðani hon eftir lesnað flutti aftur til Føroya tikið lut í politiskum arbeiði.

– Vit mugu tryggja okkum frameftir, soleiðis, at her verður liviligt komandi árini. Tað er ikki nóg mikið at hyggja eitt valskeið fram – vit mugu seta okkum mál, sum røkka munandi longri, sigur hon.

### Vælferðarsamfelagið

Tingkvinnan fyri Javnaðarflokkin er nógv upptikin av vælferðarsamfelagnum, sum í veruleikanum er eitt modell, sum í stóran mun er brúkt í okkara norðurlendsku grannalondum.

Vælferðartænasturnar skapa ein tryggleika, sum ger at fólk trívast ísamfelagnum. Tær verða skaptar í samstarvi millum myndugleikarnar, vinnuna og borgararnar.

– Tí er tað so avgerandi, at vit sum politikarar duga at miðla, hvussu stóran týdning vælferðarsamfelagið hevur fyri okkum og fyri at vit trívast her, sigur hon.

Hon vísir á, at hesi seianstu árini er nógv hent, sum ger, at nógv ikki skilja hvat vælferðarsamfelagið er - og hvønn týdning tað hevur.

– Seinasta samgongan gjørdi alt ov lítið fyri at viðlíkahalda samfelagið. Tí versnaðu viður skiftini. Grundgevingin var ofta, at »tað lá ikki fyri« at gera neyðuga viðlíkahaldi, sigur hon.

Hon sigur, at Javnaðarflokkurin hevur verið í mongum samgongum. Ikki altíð eru vælferðartænasturnar blivnar betri, men hin vegin, so eigur ikki at vera gloymt, hvat Javnaðarflokkurin hevur gjørt.

– Um flokkurin ikki hevði havt verið partur av hesum samgongum, so høvdu vit havt sæð katastrofur á økinum, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Dagsins politikkur

60-ára gamla tingkvinna Javnaðarfloksins hevur nógvar politiskar royndir. Umframt at sita í tinginum erh on eisini partur av Tórshavnar býráð.

Í dag sær hon hópin av politiskum markamótum, sum gera tað eitt sindur torført at reka politikk.

Hon nevnir gjónna millum bygd og bý umframt stríðið um samband og loysing.

– Hetta eru mál, sum ofta forða fyri, at vit fáa gjørt tær stóru semjurnar, sum bera longur fram enn bert til komandi val, sigur hon.

Hon vísir á, at í ár hevur tað fylt nógv, at ríkisveitingin úr Danmark aftur er fryst.

– Hetta fyllir so ómetaliga nógv, men úr einari fíggjarlóg uppá 4,5 milljardir krónur er her talan um 600.000 krónur.

### Samansetingin av borgarunum

Helena Dam á Neystabø hevur sum sagt serligan áhuga fyri haldføri í búskapinum.

Tí hevur hon eisini arbeitt nógv við, hvussu tað ber til at broyta fólkasamansetingina. Vit gerast fleiri og fleiri eldri og verður onki gjørt, so lioggur ein bumba undir komandi samfelagnum.

– Vit verða eldri og eldri og tí mugu vit tryggja okkum, at so nógv ung, sum møguligt koma aftur til Føroyar at arbeiða. Tað eru hesi fólkini í arbeiðsførum aldri, so skulu tryggja livikorini í landinum komandi mongu árini, sigur hon.

Eitt av amboðunum at tryggja haldføri er at byggja samfelagið upp soleiðis, at yngru fólkini koma aftur til landið.

– Tey átøk, sum bæði land og kommunur hava gjørt í seianstuni peika rættan veg. Eg veit, at flestu føroyingar vilja sleppa heimaftur og at endaliga lønin ikki altíð er avgerandi. Tí er tryggleikin og trygdin í vælferðarsamfelagnum avgerandi, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon heldur eisini at Føroyar er eitt land við frælsi, ahr hvør einstakur hevur stóra ávirkan á egnan gerandisdag. Tað er ein av orsøkunumtil at vit vilja búgv her, umframt sjálvandi at vit eru føroyingar.

– Tí er eisiniu neyðugt við samhaldsfesti. Vit noyðast øll at gjalda til samfelagið fyri at tað skal virka og fyri at vit kunnu hava tær tænastur, sum vit fegin vilja hava at virka, tá ið vit hava brúk fyri teimum, sigur Helena Dam á Neystabø.